Eg tær ein boðskap   Lag: Hj. 333. E-dur, c.

```
E                              H      E
Eg tær ein boðskap frá Jesusi beri,
                         Fiss        H
fagnaðarheilsan til syrgjandi sál:
E                           H     A       E
syndarar leitar hann upp! Vilt tú hoyra?
A            E             H              E
Meistarin kallar teg, kenn tó hans mál!
```

Niðurlag:

```
E                                        H
Á teg nú hann kallar, ja, teg nú hann kallar.
      A         E           H        E
Hoyr Jesus teg kallar, hann kallar á teg! 1)
```

2. Eg tær ein boðskap frá Jesusi beri:
eingin á jørð hevur kærleik' sum hann;
kann enn ein móðir sítt bróstabarn gloyma,
ongantíð gloyma teg frelsarin kann! 2)

3. Eg tær ein boðskap frá Jesusi beri,
gleðilig boð til hvønn syndara her:
við sínum deyða hann vann okkum frelsu,
syndin er strikað, hann náði tær ber!

4. Eg tær ein boðskap frá Jesusi beri,
vilt tú vanvirða tey boðini sæl?
Hann hevur elskað, teg elskað til deyða,
gev honum hjartað, hann vil tær tað væl!

5. Eg tær ein boðskap frá Jesusi beri,
honum, sum gav tær í frelsuni lut.
Vilt tú ei Jesusi falla til kníggja,
siga sum Tummas: "Mín Harri, mín Gud?" 3)

1) 1. Tess. 5,24. 2) Jes. 49,15. 3) Jóhs. 20,28.
R. R. Cousн. Johs. Mortensen 1955.